# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

† 

## Andlát og jarðarferðir

**Hans Jacob Rasmussen**, ættaður úr Klaksvík, búsitandi í Esbjerg, andaðist hósdagin 22. januar, 62 ára gamal. Jarðarferðin verður frá Vestmanna Kirkju týsdagin, 27. januar kl. 14.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at okkara kæra mamma, omma og langomma

**Martha Matras**
(f. Mørkøre)
fødd 21. oktober 1909

andaðist sunnudagin 25. januar 2009, 99 ára gomul.

*Fyri tey avvarðandi*
**Jórun**
**Marna, Erla og Kára**

## Takk



Tit, sum gleddu meg á 60 ára degnum: Túsund takk! Stórt spell, at summi ikki komu fram – til tað, sum gjørdist einki minni enn ársins veitsla. Ein serlig tøkk til Jákup, Dávid, Gitte, Teresu, Suna, Eriku og Sjúrð, sum skipaðu fyri, og gjørdu dagin ógloymandi.

**Snorri Fjallsbak**

## Takk

Hjartaliga takki eg øllum tykkum, sum á ymiskan hátt vóru við til at gera mín 70 ára føðingardag so hugnaligan.

**Blíðar heilsanir**
**Sanna Jacobsen, Klaksvík**

**Dagurin**
**26. januar. Polycarpos**, deyður umleið ár 155. Var biskupur í Smyrna og høgt mettur kirkjumaður í Lítluásia. 86 ára gamal verður hann píndur og tikin av døgum. Navnið hevur enntá í nýggjari tíð verið brúkt sum mansnavn í Føroyum, Karpus.
*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum)*

# Brandur Øssursson 75



Leygardagin 24. januar fylti Brandur Øssursson, fyrrverandi heilsølumaður og musikkskúlalærari, 75 ár.

Brandur er føddur og uppvaksin í Keypmannahavn. Foreldrini vóru: Margit, f. Nygaard, frá Stiklestad í Norra, og Janus Øssursson, úr Havn.

Liðugur við skúlan lærdi hann til bókbindara. Sum 21 ára gamal byrjaði hann sum yrkistónleikari og ferðaðist í Norðurlondum við sínum egna orkestri. Sjálvur spældi hann saxofon. Teir ferðaðust í Danmark, Finlandi, Svøríki og í Norra. Hetta helt á í eini tíggju ár.

Í 1957 giftist Brandur við Unnu, dóttir Helgu, f. Christiansen, ættað úr Kvívík, og Jacob Frederik Øregaard, fyrrverandi løgtingsog løgtingsformann í Norðragøtu.

Í 1965 fluttu tey til Føroya at búgva og stovnaðu sína egnu heilsølu, sum seldi ymiskar kioskvørur og umboðaðu kendu donsku Premier ísarnar. Í fyritøkuni arbeiddu eini 10 fólk, tey høvdu m.a. fleiri frystibilar, sum koyrdu við ísi.

Fyrst í 80-unum góvust tey við heilsøluni, og Brandur fekk starv sum musikklærari við Tórshavnar Kommunuskúla. Í 1988 bleiv hann settur sum leiðari av rútmisku deildini hjá Tórshavnar Musikkskúla.

Brandur skipaði fyri nógvum ymiskum tónleikatiltøkum, mest kendur er hann fyri Jazz-festivalin, sum hann skipaði fyri hvørt ár í heili 20 ár. Jazz-festivalurin hevur tilsamans hýst eini 3000 tónleikarum.

Hann hevur verið við til at mynda ein stóran part av rútmiska tónleikinum í Føroyum. Hann stóð t.d. á odda fyri Big Band, stovnaði Popp-Topp fyri ungar óroyndar tónleikarar, og Ungar Jazz-kometir.

Unna og Brandur eiga synirnar Finn og Kára. Í august 2003 fluttu Unna og Brandur til Danmarkar at búgva.

*-red*

# Martha Matras deyð 99 ára gomul



*Martha Matras, vinstumegin, og systir Anna Askham. Myndin er tikin á Ellisheiminum í Havn, tá Anna fylti 104 ár í 2005*

*Mynd: Eirikur Lindenskov*

Sunnudagin 25. januar andaðist Martha Matras í Havn, 99 ára gomul.

Martha var úr Havn, foreldrini vóru Johanna Sofía, f. Niclassen, ættað úr Kollafirði og Jákup Christian Mørkøre, ættaður úr Leirvík. Tey bæði giftust so í 1896 og búsettust í C. Pløyensgøtu í Havn. Tey fingu 9 børn, seks gentur og tríggjar dreingir, har Martha var tað sætta barnið í røðini.

Í 1933 giftist Martha við Sámal Erik Matras av Viðareiði. Hann var lærari og serstakliga varð hann kendur sum fimleikalærari. Martha og Sámal Erik búsettust í Havn.

Sámal Erik var føddur á Viðareiði í 1898. Hann tók læraraprógv í Haslev Seminarium í 1922 og var lærari í Tórshavnar Kommunuskúla frá 1925 til hann mátti gevast fyrst í 1950-unum. Sámal Erik hevði manslið í fimleiki í mong ár. Hann var við til at stovna Tórshavnar Handilsskúla í 1936 og stóð fyri skúlanum til hann gjørdist sjúkur. Hann var blaðstjóri á Tingakrossi frá 1940 til 1943.

Í 1949 fluttu Martha og Sámal Erik í egin hús í Dj. í Geilsgøtu. Men fyrst í 1950 fekk Sámal Erik heilabløðing og lammaðist. Hetta broytti umstøðurnar hjá Marthu, sum nú mátti nýta alla sína orku at passa mannin. Sámal Erik andaðist 29. juni í 1960, 61 ára gamal.

Martha og Sámal Erik fingu tvær døtur: Bjørg í 1935 og Jórun í 1938. Bjørg var gift við Hera Jensen, sum starvaðist á Matrikulstovuni. Heri andaðist í 1995 og Bjørg andaðist í 2000. Jórun er gift við Petur Ellefsen oyrnalækna.

Seinastu árini búði Martha á Ellisheiminum í Havn.